# Sørvágs skúli

Skúlavegur 13 . FO-380 Sørvágur
Tlf. 36 32 22 & 23 32 22
Fax 36 32 21 · sor@skulin.fo

## Lærarastørv í Sørvágs skúla

**Søkt verður eftir:**
1 lærara í fast starv.

3 lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2008/09 vegna farloyvi, barnsburðarfarloyvi, niðursettum tímatali, til serligan tørv og til avlopstímar

1 lærara í tíðaravmarkað starv frá 1. august til 16. desember 2008 vegna barnsburðarfarloyvi

Okkum tørvar lærarar, sum kunnu undirvísa í: Føroyskum, Støddfrøði, Náttúru og tøkni, Dreingjaítrótti og Evning

**Førleikakrøv:** Læraraútbúgving og linjulestur í viðkomandi lærugreinum.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 – 27.4

**Nærri kunning** um størvini fáast við at ringja til Andrass Henriksen, skúlastjóra, á tel. 363222 ella 233222, ella Eyð Niclasen, varaskúlastjóra, á tel. 223670

**Umsóknir** við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi **í seinasta lagi 20. juni 2008 kl.12.**

Í Sørvágs skúla eru 145 næmingar í 1. til 10. flokki. 16 lærarar starvast í skúlanum. Frá skúlabyrjan 2008/09 hava lærarar skúlans fyrireikingarhøli við egnum skrivi-borði og egnari farteldu.

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

# Hjálparfólk til kantinuna

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til kantinuna, at byrja 18. august 2008. Vit leggja dent á, at fólkið, ið sett verður er raskt, álítandi og nærlagt í sínum arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert von/vanur við køks- og/ella kantinuarbeiði.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag. Starvið er tímalønt í royndartíðini, sum er 3 mánaðir. Eftir royndartíðina kann talan verða um fast mánaðarlønt starv.

Vanliga arbeiðstíðin er mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 15.00 og fríggjadag frá kl. 8.00 til 14.30, teir dagar tá skúlagongd er. Kvøldarbeiði kann koma fyri í sambandi við foreldarafundir og onnur tiltøk.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Oslu Funding kantinuleiðara á tlf. 313771.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldu-postur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni, kl. 12.00.

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

# Skúlatænari til Føroya Studentaskúla í Hoydølum

Eitt starv sum skúlatænari er leyst at søkja á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði frá 1. august 2008.

**Uppgávur**
Uppgávurnar eru: Umsjón við og røkt av bygningunum hjá stovninum, at røkja økið uttan um bygningarnar, eftirlit við hita-, vatn- og elskipan skúlans og at rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk og at vera til handa í dagligu viðurskiftum skúlans. Skúlatænararnir arbeiða í skiftandi vaktum og tí koma skeivar arbeiðstíðir regluliga fyri. Á skúlanum koma frá 1. august at starvast 3 skúlatænarar og verandi 1. skúlatænari er leiðari fyri skúlatænararnar og reingerðarstarvsfólkið.

**Førleikar**
Tann, ið settur verður eigur at hava handverkaraútbúgving, gott yvirlit og góð evni at samstarva. Ávísur telduførleiki er ein fyrimunur. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt spennandi og fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvið verður at seta frá 1. august ella skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, telefon 312973 ella Holgar Johansen, skúlatænara, fartelefon 214613.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og frágreiðingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni, kl. 12.00.



# TIL SØLU

BMW 316i E46, ný sýnaður. Árg. 99

**SLP Finans**

Á Hjalla 6 · Tlf. 357300 · Mobile 21 73 00 · Tlf. 21 73 00

**FUGLAFJARÐAR KOMMUNA**

# STARV SUM LEIÐARI FYRI FUGLAFJARÐAR SLØKKILIÐI

Starvið sum leiðari fyri Fuglafjarðar sløkkilið, sum er ein deild av Fuglafjarðar kommunu, verður hervið lýst leyst til setan tann 1. juli 2008 ella skjótast eftir hetta.

**Krøv:**
- Viðkomandi skal hava handverksliga ella byggifrøðisliga útbúgving.
- Skal hava tikið ella skal taka neyðug skeið sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmanningum og brunaumsjónarmonnum.
- Skal verða við til at menna kommunala brunaverkið og brunamenninar, so sløkkilið altíð er á einum tekniskt forsvarligum støði.
- Heilsuváttan verður kravd.
- Skal hava stóra koyrikortið.
- Skal hava góð samstarvsevni.

**Lønar- og setannarviðurskifti:**
- Starvið, sum verður normerað til 15 tímar um vikuna, verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.
- Fyrstu 3 mánaðarnir verða at rokna sum royndartíð.

**Nærri upplýsningar**
um starvið kunnu fáast við at venda sær til William S. Askham, sløkkiliðsleiðara á telefon 737800 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

**Umsóknarfreist:**
Skrivligar umsóknir saman við próvskjølum skulu verða Fuglafjarðar býráð, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi hósdagin tann 19. juni 2008 kl. 16.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.



# TIL SØLU

Brúkt JCB gravimaskina 2,4t við vogni.
Árg. 2001, koyrt 1800 tímar

**SLP Finans**

Á Hjalla 6 · Tlf. 357300 · Mobile 21 73 00 · Tlf. 21 73 00